# Viðmerkingar til Uppskot til Løgtingslóg um almenna talgilda postskipan

Sum heild er grundtankin við lógaruppskotinum góður. Tað er gott at ætlanin er, at tað skal vera valfrítt, hvørt ein brúkar Mínboks ella ikki. Bæði í mun til at varðveita sjálvsavgerðarrættin hjá fólki, og í mun til at ikki allir samfelagsbólkar kenna seg heima í talgildum umhvørvum. Somuleiðis er tað gott, at lógaruppskotið leggur dent á, at Mínboks skal fylgja Web Content Accessibility Guidelines (WCAG).

Hinvegin eru nøkur øki, har uppskotið kann betrast ella gerast greiðari.

## § 3. - Er Mínboks valfrítt hjá øllum?

Ein avbjóðing við lógaruppskotinum er tá um ræður persónar, ið noyðast at brúka talgilt samskifti. Eitt nú fólk, ið hava avbjóðingar við sjónini, og avbjóðingar tá um ræður at lesa, noyðast at brúka talgildar tænastur at lesa skjøl fyri sær. Sostatt er vanligt brævasamskifti einans í lítlan mun eitt veruligt alternativ hjá hesum bólkinum.

Velja tey at samskifta við vanligum brøvum, so krevur tað antin, at tey lata onnur fólk lesa skjølini við persónsupplýsingum fyri sær, ella at tey brúka appir at skanna brøvini og lesa tey fyri sær. Báðir møguleikar hava avbjóðingar. Tað er ikki torført at ímynda sær støður, har ein helst ikki vil, at onnur lesa eins persónsviðkvæmu upplýsingar. Viðvíkjandi appunum, ið skanna og lesa, so er tað ógvuliga ringt at tryggja sær, at vitanin í skjølunum verður viðgjørd/goymd á tryggan hátt.

Sostatt er tað ivasamt, hvørt hesir samfelagsbólkar hava ein veruligan valmøguleika, tá um ræður at brúka Mínboks, um tey ikki longur kunnu fáa skjøl við vanligum teldupostssamskifti. Vil ein varðveita valmøguleikan hjá hesum bólkum er spurningurin tískil, hvørt ein eigur at hyggja at einum tryggum og einfaldum máta at samskifta við teldupostum.

Aðrir bólkar, sum kunnu hava eina avbjóðing, tá um ræður kravið um talgilt samskifti via Mínboks, er útlendingar, ið nýliga eru fluttir til Føroyar, og tí ikki hava Mínboks, fólk, ið búgva uttanlands, ikki hava Mínboks, og skulu samskifta við føroyskar myndugleikar um persónsviðkvæmar upplýsingar, og fólk, ið ikki skilja tey mál, ið ein kann nýta til Mínboks.

Tískil er nógv, ið bendir á, at tað hevði verið rættast, at ikki hava eitt avgjørt forboð móti teldupostssamskifti – tó at hetta má vigast upp ímóti hvørt ein kann gera tað á tryggan hátt.

## § 3. stk. 2 – aðrir portalar og WCAG

Ein avbjóðing við § 3 stk. 2 er, at hetta letur upp fyri, at tað almenna veitir trúnaðar og persónsviðkvæmar upplýsingar á pallum, sum ikki fylgja WCAG. Viðmerkingarnar til lógaruppskotið gera tíbetur nógv burturúr, at Mínboks skal fylgja WCAG. Hinvegin stendur ongastaðni í viðmerkingunum, at aðrir portalar, sum fylgja krøvunum í § 3. stk. 2, skulu fylgja WCAG. Tískil er vandi fyri, at teir samfelagsbólkar, ið hava tørv á WCAG, ikki kunnu brúka teir portalarnar.

Í hesum sambandi eigur ein eisini at hava krav um, at tær heimasíðurnar, har portalarnir liggja á, eiga at fylgja WCAG. Fylgja bara portalarnir sjálvir WCAG so kann ein enda í eini støðu, har portalarnir eru lættir at brúka, men tað ber ikki til hjá fólki, at brúka lesarar ella onnur tól, at koma fram til portalin.

## Web Content Accessibility Guidelines

Sum sagt er tað gott, at lógaruppskotið krevur, at Mínboks fylgir WCAG. Tó eru tað tvey ting, sum kunnu betrast.

WCAG er dagført fleiri ferðir, og tískil eru eisini ymiskar útgávur av WCAG. So hvørt tøknin broytist og so hvørt, sum ein leggur merki til, at har eru manglar, ella ting, ið kunnu betrast við WCAG, so verða krøvini eisini dagførd. Í løtuni er nýggjasta WCAG útgávan WCAG 3. Tað hevði tí verið best, um ein gjørdi greitt, at tað er WCAG 3 ein skal nýta, og at so hvørt nýggj krøv koma, so eigur ein eisini at fylgja teimum.

Ein onnur avbjóðing er, at sum vit skilja tað, so sigur ein longu nú, at Mínboks er atkomulig. Vit hava samskift við áhugafeløg og ráðgeva innan økið, og sum er eru manglar við Mínboks, ið gera, at Mínboks ikki riggar nóg væl hjá teimum bólkum, ið WCAG skal hjálpa. Tí er tað av alstórum týdningi, at hesir manglar koma uppá pláss, áðrenn lógin fær gildi.

Spurningurin er eisini, hvørt tað ikki er rættast, at kravið um atkomuligheit fyri fólk, ið kunnu hava avbjóðingar, verður nevnt ítøkiliga í lógini, og ikki bara í viðmerkingunum.

## § 5. - Nær postur er móttikin

Eitt ivamál, sum viðmerkingarnar til § 5 kunnu fáa greiðari, er um har er ein støða, har boðini eru komin fram á Mínboks, og sostatt eru atkomandi, men ein feilur í skipanini ger, at móttakarin hevur grundaða orsøk at halda, at eingin boð eru komin. Hetta er serliga um ein hevur skrivað seg upp, at

fáa boð á teldupostin hjá sær, hvørjaferð eini boð eru komin á Mínboks, men ein so av onkrari orsøk ikki móttekur ein teldupost um at boð eru komin. Boðini liggja á Mínboks og eru atkomandi, men ein feilur í skipanini hjá Mínboks kann tá gera, at ein ikki fær nakra notifikatión, og tí ikki fer inn á Mínboks at hyggja. Er hetta tá ein feilur í skipanini, sum ger at t.d. ein kærufreist ikki eigur at telja frá tá, at boðini liggja á Mínboks, ella liggur ábyrgdin altíð á móttakaranum, bara boðini eru komin fram í Mínboks?

## Samanumtikið

Yvirhøvur eru grundtankarnir við lógaruppskotinum góðir. Tað er gott, at ein ikki tvingar fólk at brúka Mínboks. Tað er somuleiðis gott at leggja dent á atkomumøguleikar við WCAG, og hevði verið uppaftur betri, um tað er nýggjastu útgávu av WCAG ein setur fram krav um at fylgja.

Tað hevði verið gott um ein kom við eini uppfylgjandi lóg, bæði fyri at tryggja atkomu í øllum tættum hetta lógaruppskotið nertur við, og meira generelt, har ein í minsta lagi setur fram krav um, at allir almennir stovnar og tænastur skulu fylgja WCAG 3 á teirra heimasíðum og portalum. Ideelt setti ein um sama mundi fram krav um, at fyritøkur, ið eru størri enn eitt vist, ella veita grundleggjandi tænastur (so sum bankar og tryggingar) eisini fylgja teimum krøvum.

Líkist støðan í Føroyum støðuni uttanlands, so eru tað 15 – 20% av føroyingum, ið kundu fingið gagn av WCAG 3. Sum er hevur hesin bólkurin av fólkinum avbjóðingar tá um ræður at finna kunning, seta seg í samband við myndugleikar, og at luttaka í samfelagskjakinum. Tí er tað gott og neyðugt, at ein setur fram krav um WCAG í lógaruppskotinum, og tað er vónandi eitt tekin um, at ein fer at leggja størri dent á talgilda inklusjón í framtíðini.